# ÚTBJÓÐINGARSKRIV

## *FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA* – INNKEYP AV LABORATORIUM INNBÚGVI TIL SVH – ÁHEITAN UM AT GEVA TILBOÐ

*Landsverk* (hereftir "Ordragevari") heitur hervið á tykkara fyritøku at geva tilboð uppá gera omanfyristandandi uppgávu.

Útboðið verður framt sum eitt, *alment útboð sambært rundskrivið um keyp av vørum og tænastum nr. 9000 frá 1. Juli 2016.*

### 1. Útboðstilfarið

Útboðstilfarið er sammansett av:

- Hesum útboðsbrævinum
- Tekningar sambært yvirliti yvir tekningar dagf. tann 07-11-2017
- Frágreiðing og treytir, dagf. tann 07-11-2017
- Tilboðslisti dagf. tann 07-11-2017
- Høvuðstíðarætlan dagf. tann 07-11-2017
- Trú- og heiður váttan um falna skuld til tað almenna (Paradigma hjá Landsverk)

Útboðstilfarið er atkomuligt gjøgnum talgilda samskiftispallin hjá Ordragevara á https://www.ibinder.com/External/EnquiryLink.aspx?id=goodfveycg

Tað er gjørligt hjá brúkarum av iBinder at tilluta loyvi til at síggja útboð gjøgnum iBinder. Vegleiðing er eisini at finna á www.iBinder.com.

Spurningar og support til samskiftispallin iBinder kunnu vendast til:

Helgi Johannesen
telefon 290 873
teldupost hejo@lv.fo

### 2. Tilboðsfreist og innlatingar adressa

Tilboð skulu latast inn talgilt gjøgnum samskiftispallin hjá Ordragevara, sum er iBinder.

Innlating av tilboðum fer fram við at uppsenda samlað tilboð til skiljiblað ´04. Tilboð´, inni í samskftispallinum iBinder.

Vísast skal til vegleiðingina á heimasíðuni hjá iBinder: https://www.ibinder.com/pub/dk/filmklip.aspx undir "Digitalt udbud".

Tilboð skulu handast í síni heild í seinasta lagi:

*Týsdagin 05-12-2017, kl. 14.00*

Kunnandi verður freistin eisini ásett í iBinder.

Tilboð sum koma inn eftir hesa freist verða ikki tikin við til metingar.

## 3. Sýn á staðnum og spurningar

Sýn á staðnum verður hildið týsdagin 14-11-2017, kl. 10.00. Fundarstaður er Sjóvinnuhúsið, Vestara Bryggja 15, 100 Tórshavn, 2. hædd, rúm 276.

Av praktiskum ávum verða tit biðið um at boða frá fráboðan, um tykkara fyritøka ætlar at luttaka til sýn á staðnum og hvussu nógv koma (tó ikki fleiri enn 2 umboð fyri hvønn tilboðsgevara), seinast mánadagin 13-11-2017. Fráboðanin fer fram við at senda teldupost til Kiha@lv.fo.

Spurningar verða ikki svaraðir meðan sýn fer fram á staðnum, men hildið verður felags spyrjifundur á staðnum beint eftir sýnið.

Frásøgn frá spyrjifundinum verður løgd út á iBinder skjótast gjørligt.
Eftir viðgerð av spurningum verður um neyðugt, gjørd rættingarbløð til útboðstilfarið.

## 4. Spurningar

Spurningar skulu setast á føroyskum og í iBinder undir skiljiblað 05 – Spurningar og svar. Spurningar skulu setast í seinasta lagi mikudagin 22-11-2017. Spurningar verða svaraðir skrivliga og dulnevndir. Svar verða atkomulig fyri allar tilboðsgevarar á iBinder í seinasta lagi mánadagin 27-11-2017.

## 5. Tillutarnarkriterium

Tillutanarkriterium er besta lutfall millum prís og góðsku við hesum vektaðu tillutarnartreytum:

1. Kostnað 50 %
2. Góðska 50 %

**Viðv. 1**. Við undir tillutarnartreyt konstnað skal skiljast tilboðið við tí lægsta prísinum.

Í metingini verður dentur lagdur á lægsta prís.

Tillutarnartreytin kostnað verður mett út frá tí samlaða tilboðnum hjá tilboðsgevaranum, sum skrivað á samli postin á framsíðuni á tilboðslistanum.

Viðv. 2. Við tillutarnartreytini góðska skulu skiljast hesar undir tillutarnartreytir:

- Haldgóðska
- Virkisføri

Við haldgóðsku verður víst til, hvussu livitíðin er á vøruni, við virkisføri verður víst til hvussu funktionel vøran er í mun til ætlaðu nýtsluna.

Í metingini av undir tillutarnartreytunum haldgóðska og virkisføri, verður dentur lagdur á:

- Í hvønn mun tilboðsgevarin hevur eitt tilboð, sum virkar fyri at føra er haldgóð og álítandi, einkul í sínari tilevning og væl egna til lættari laboratorium-arbeiði og undirvísingar umhvørvi tvs. í síni heild tryggja góðan henleika og haldgóðsku. Tað verður mett positivt um veitarin kann vísa á referansur, sum vísa á laboratorium til líknandi virkið sum lýst í útbjóðingartilfarinum og har brúkarin hevur givið positivt ummæli av innbúgvinum.
- Við virkisføri verður dentur lagdur á, í hvønn mun tilboðsgevarin veitur eina vøru, sum er brúkilig og í hvønn mun vøran er løtt at handfara í dagligdegnum, bæði fyri næmingar og starvsfólk. Eisini verður dentur lagdur á hvussu vøran er  samlað t.d. um tað eru nógvir kantar og samlingar, sjónligar skrúvir o.l.. Her  er tað positivt um vøran er í so fáum eindum sum gjørligt, at samlingar eru fukaðar saman ella samlaðar á ein slíkan hátt, at skittur o.l. ikki kann leggja seg í foyrur og sprekkur. Tað verður somuleiðis mett sum positivt um vøran í síni heild er løtt at reingerða og tølir reingerðarlút so sum ethanol uttan at taka skaða ella broyta útsjónd.

Undir tillutarnartreytirnar verða mettar út frá einari samlaðari meting av tilboðnum.

Svar til undir tillutarnartreytina góðska eigur ikki at rúma meira enn 8 A4 síður við teksti og myndum. Tilboðsgevarin eigur at leggja seg eftir, at svara hvørjari undir tillutarnartreyt ítøkiligt gjarna við serstøkum punkti.

## 6. Meting av tilboðið

Tilboðini verða mett út frá einum prísmyndil við denti á omanfyristandandi kriterium.

Prísurin er tann samlaði tilboðsprísurin, sum skrivað í framsíðuni á tilboðslistanum.

Góðskukriteriini verða mett eftir eini metingarstiga frá 0-10, har 0 verður givið har tilboðið ringast lúkar ítøkiliga treytina og 10 verður givið fyri bestu møguligu lúkan av ítøkiligu treytini.

Stig fyri góðsku treytina verða umroknað til ein metingarprísur fyri góðskukriteriir. Umrokning av stigum fer fram við at taka miðalprísin av móttiknu tilboðum og býta hetta við stigan (10).

Tilboðsprísurin og góðsku metingarprísirnir verða faldaðir við ásetta vekting í prosentum.

Komið verður fram til endaliga metingarprís við at leggja saman vektaða tilboðsprísin og góðskuprísin.

Tilboðið við tí samlaða lægsta endaliga vektaða metingarprísinum fær tilluta uppgávuna.

### 7. Fyrivarni/Alternativ tilboð

*Tilboð við fyrivarni kunnu verða í vanda fyri at vera havnað.*

*Alternativ tilboð verða ikki tikin við.*

### 8. Freist ið tilboð stendur við

Tilboð skal standa við í 60 arbeiðsdagar frá at tilboðsfreistin er farin.

Kunning um avgerð um tillutan ber ikki í sær at tilboðsgevari er frítikin frá sínum tilboðið.

### 9. Krøv til tilboðið

Tilboðið skal latast inn á føroyskum.

Tilboðið skal lúka tey krøvini, sum tey standa í útboðstilfarinum á iBinder.

Brúk av excel tilboðslistanum fer fram undir egnari ábyrgd.

Um tilboðsgevarin er eitt samstarv millum fleiri búðskparligar partar, so sum eitt samtak, so skal hvør einstakur luttakari skriva undir eina trú- og heiður váttan um skuld til tað almenna.

Um tilboðið ikki lúkar omanfyristandandi krøv, kann tað í síni heild verða mett sum ikki at lúka tær treytir, sum standa í útboðstilfarinum.

Vit síggja fram til at fáa tykkara tilboð.

Vinarliga

**Kirstin Hansen**
Verkætlanarleiðari